# Atlantsflog vil nøkta oljutørv

FLOGFERÐSLA
*Jan Müller*

Tilstundandi oljuleitingin við Føroyar er høvuðsorsøkin til, at føroyska flogfelagið Atlantsflog longu nú setir kósina móti Skotlandi – við ikki minni enn tveimum flogferðum um vikuna, mánakvøld og hóskvøld. Upprunaliga ætlanin var at byrja 26. mars við einum túri um vikuna. Nú verður so farið í gongd 19. februar. Magni Arge, stjóri sigur, at hetta fer at geva eitt nú fólki í oljuvinnuni ein góðan møguleika at koma skjótt og bíliga til Føroya at halda fundir. Og hjá føroyingum at fara hinvegin. Tað gevur eisini góðar møguleikar at fara víðari til Stavanger og London sama kvøld. Og tað vendir so eisini øvugt, har tú kanst koma úr Stavanger og London og sleppa víðari til Føroya um sama mundið.

Magni Arge sigur, at teir gera sær stóran ómak at lurta eftir øllum teimum signalum, sum koma, og hesi eru m.a., at fundir verða hildnir í Keypmannahavn og London heldur enn í Føroyum, tí ferðingin er so trupul. Tað er hetta, sum Atlantsflog nú vil bøta um bæði fyri at veita eina eftirspurda tænastu og har-við fáa inntøkumøguleikar men esini fyri at skapa grundarlag undir virksemi her á klettunum. Tað er so eisini í samsvar við andan í oljulóggávuni, at virksemi, sum er tengt at eini komandi oljuleiting, skal so vítt møguligt fara fram í Føroyum. Dømi um slíka positiva gongd er m.a. tann sannroynd, at meðan ráðstevnur um oljuvinnu um okkara leiðir fyrr hava verið hildnar í Aberdeen, eru tær nú í Føroyum. Fyrsta slíka ráðstevna var í Norðurlandahúsinum í fjør og verður helst endurtikin í vetur.

Magni Arge sigur annars, at hyggja vit at hesi gongdini út frá einum menningarsjónarmiði, so hevur man brúk fyri at hava javnt og støðugt samband við økini rundan um okkum. Her er jú talan um eitt nýtt handilsøki. Eitt týttari samband skundar undir ein positivan útvikling og kann føroyska flogfelagið vera við til at byggja brýr millum londini bæði eins og gjørt hevur verið við Danmark og nú eisini Noreg.



*Magni Arge, stjóri: – Vit vilja vera við at menna samvinnuna við grannalondini*

VIÐMERKINGAR

# Hatta var dropin!

**Hanna Pálsdóttir Vang**

»Útjaðarin skal mennast«. Tað hava okur hoyrt ofta, men tað eru bara tóm orð, ið politikararnir siga fyri at tekkjast íbúgvarunum í útjaðaranum, tí okur síggja tað ikki í verki! Men latum okum bara øll flyta til miðstaðarøkið og oyða restina av landinum! Munnu tey kunna hýsa okum har norðuri?

Enn einaferð verða Suðuroyingar skjúgvaðir til viks. Oljuútgerðarhavnin, sum øll vóru sannførd um fór at liggja á Drelnesi, varð eisini tikin frá okum.

Eftir at hava hoyrt tey skelkandi tíðindi í útvarpinum, um at oljuútgerðarhavnin skuldi liggja í Runavík ella Havn, hoyrdu okur Høgna Hoydal siga, at hetta var ímóti løgtingssamtyktini, og so væntaði mann, at politikararnir fóru at leggja uppí, men so varð ikki. Teir høvdu fund og avgjørdu, at »okkurt« oljuvirksemi skuldi vera í Suðuroynni. Heilt erligt, hava teir null virðing fyri suðuroyingum? Halda teir, at suðuroyingar so bara siga »ná ókey, so er í lagi«? Tað halda teir óivað, tí suðuroyingar hava funnið seg í so nógvum frammanundan, at nú ger ikki mun longur.

Nýggjan miðnámsskúla hava teir lovað okum. Tað verður spennandi at síggja, um tað verður veruleiki; og hvussu við tunnlinum ímillum Øravík og Hov, man hann fara at koma? Ella eru tað eisini bara tóm orð?

# Tað hongur ikki saman hjá Póli

**Bjørn Patursson**
*Koltri, Samiska Tjóðardagin 2001*



Tað er eingin grund at yvirtaka málsøkir um ikki ætlanin er, at vit gerðast sjálvstøðug! Tað haldi eg at Pól Nyrup eisini veit.

Um endamálið ikki er sjálvstýrið so meini eg avgjørt at tann sum valdar eisini skal gjalda.

**Tað hongur ikki saman hjá Póli**
Nyrup segði í dag, at danska stjórnin er sinnað til, at samráðast við okkum føroyingar um yvirtøkur av málsøkjum eftir eini nærri lýstari ætlan, eftir heimastýrislógini. Síðani skundaði hann sær at hótta við, at blokkurin skal niðurtrappast yvir eitt 4 ára skeið. Men hvat er blokkurin gjald fyri? So vítt eg veit, er blokkurin júst gjald fyri tey málsøkir vit tosa um í avtaluni.

**Ja**
Við hesi ætlan hevur Føroya Landsstýrið so vítt tað ber til gingið øllum ámøtið. Størsti parturin av anstøðuni hevur sagt seg kunna ganga hesa leið og kann danska stjórnin ikki taka undir við ætlanini er ein nýggj støða komin í sum kemur at verða lítið sømilig fyri Danmark sum imperium.

**Soleiðis skiljið eg støðuna**
Koltur fer aftur hesaferð 100% at stuðla ætlan landsstýrisins sum gjørt var í 46. Við okkara ja-atkvøðum til uppskot landsstýrisins 26. mai, geva vit landsstýrinum okkara fulla stuðul til at fara til donsku stjórnina við eini løgtingslóg, sum hevur stuðul frá fólkinum, har biðið verður um:

-at danska stjórnin noterar sær okkara ætlan um:
-AT VIT NÚ HAVA AVGJØRT, AT GERA FØROYAR FÍGGJARLIGA ÓHEFTAR AV DANMARK, YVIR EITT RÍMILIGT TÍÐARSKEIÐ!

Tá vit so hava prógva, at vit klára okkum sjálvi fíggjarliga, bæði yvir fyri teimum føroyingum sum ikki trúgva tí og fyri dønum, skulu vit endaliga taka støðu til hvussu vit føroyingar statsrættarliga vilja innrætta okkum í framtíðini. Tað skal fólkið eisini taka støðu til tá. Í okkara verð er eingin ivi heldur um tað.

**Onki at verða ræddur fyri**
Hetta er og verður seinasti og einasti møguleiki vit fáa. Verið ikki ræddir! vit eru ikki einsamøll í verðini.
- Og spurningurin sum eingin tordi at koma nærri inn uppá í útvarpinum: hvat er tað sum ger at danir halda so fast um okkum tá heimastýrislógin bert snýr seg um 1,3 mia. útreiðsla?

# Suðuroyggin er partur av Føroyum … enn

**Finnleif Guttesen**
*borgarstjóri*



Hvussu leingi hetta er veruleiki vil tíðin vísa, Lítla Dímon er eisini partur av Føroyum, men har er bert livandi hjá seyði.

Nú ætli eg mær ikki at tjakast við Dánjal Bjarkhamar, býráðslim í Vági í bløðunum og eg taki fult undir við tí hann sigur seinast í grein síni 31. januar í Dimmu um, at vit sum búleikast í Suðuroy skulu samstarva - oynni og tí fólki her býr at gagni.

Men eg taki ikki undir við, at verandi samgonga og aðrar við, hava givið okkum sum búleikast í Suðuroy nakrar sømdir sum eru at rópa hurra fyri. Tað sum er komi her suður hevur bert gjørt tað, at vit tilkomnu yvirliva meðan børn okkara rýma, tí her er einki at koma aftur til. At børnini koma aftur í ferium er ikki tað sama sum at búleikast her.

**Fitt og góðtrúgvin**
Vit sum búleikast her suðri skulu ikki bara lata standa til, vera so óluksáliga fitt og góðtaka alt, vit skulu krevja okkara rætt sum ein partur av Føroyum og fáa vit ikki henda rætt so eiga vit at taka avleiðingina av tí, ein møguleiki er loysing og tað er altjóða viðurkent.

**Afrika og niðurpíning**
At ein advokatur heldur at skilið skal blíva líka so ringt sum í Afrika við loysing, har tey blíva knúst við harðari hond og í blóði trúgvi eg ikki, men at Annfinn og samgongan kann banka okkum uppá pláss er nakað annað, tí hetta er longu við at henda, tað vísur gongdin í Suðuroy.

**Hvat er eftirfarandi**
Hvussu nógv hald er í tí ætlan, sum verandi samgonga hevur viðvíkjandi íløgum í Suðuroy vil eg seta eitt stórt spurnar-tekin við.

At Torbjørn Jackobsen hevur skori ígjøgnum og sagt at Almanna-og Heilsuskúlin skal liggja á Tvøroyri taki eg hattin av fyri, men har er ikki eitt klovi oyra fylgt við til at seta skúlan á stovn, Tvøroyrar kommuna hevur bori allar útreiðsl-urnar av skúlabygninginum.

At hesin skúli kemur í gongd er eingin ivi um, tað skal so ikki skorta uppá viljan frá Tvøroyrar kommunu, um viljin frá landsins myndugleikum viðvíkjandi íløgum og fígging er líka so góður vil nærmasta tíð vísa.

**Samanhald**
Eg vóni at suðringar fara at gera meira vart við seg yvir fyri teimum sum ráða í Føroyum, líkamikið hvat politiskan lit teir hava.

At vit sum búleikast her suðri standa saman, og krevja okkara sjálvsagda rætt til møguleikarnar, sum finnast í hesum landi.

Vit kunnu ikki blíva við, at vera fitt og lata okkum alt lynda.

Vikuskifti

Nr. 29 • leygardagur • 10. februar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo



Rúni Brattaberg:
Tvey ára sáttmála í Týsklandi
síða 16-17

**VEKT Í VIRÐI. Ikki er alt gull, ið glitrar og ikki eru tað bara havsins kilo, ið geva landinum virði. Fleiri ár hava frímerki verið millum størstu føroysku útflutningsvørur. Ikki í vekt, men í virði. Nú byrjar nýtt útgávuár, sum eisini fevnir um ein hátíðardag, tá postsøgan kemur út í bók**




*1. apríl verður Postverk Føroya 25 ár*

# www.stamps.fo

FRÍMERKI
*Birgir Kruse*

Mánadagin byrjar nýggja útgávuskráin hjá Frímerkjadeildini. Serstakt við skránni hesuferð er, at Postverk Føroya hin 1. apríl verður 25 ár. Eisini hetta verður evni á frímerki henda hátíðardag.

Fyrstu frímerkini í ár ímynda Kirkjubøarstólarnar, sum nú koma heim aftur og Reyða Kross, sum hevur virkað her í landinum í 75 ár.

Tá farið varð undir at umvæla Ólavskirkjuna í Kirkjubø í 1874 vórðu Kirkjubøarstólarnir árið eftir fluttir á danska Ríkisgripasavnið, har teir enn eru í varðveitslu.

Tað hevur leingi verið eitt føroyskt ynski at fáa stólarnar heim aftur. Í 1977 játtaði danska stjórnin, at stólarnir kundu flytast aftur til Føroya, um so varð, at myndugleikarnir kundu ávísa hóskandi høli. Nú ljóðar fyri vist, at Kirkjubøarstólarnir verða aftur í Føroyum næsta ár.

Mánadagin staðfestir Postverk Føroya hendingina við fýra frímerkjum við myndum av stólagavlunum frá Ólavskirkjuni í Kirkjubø. Tó so, Postverkið hevur roynt hetta áður. Hetta er triðja røðin av sínum slag og tað er enn sum áður hin gitni frímerkjaristarin Czeslav Slania, sum hevur graverað merkini.

Dagin fyri 75 ára dag Reyða Kross, kann Postverk Føroya halda 25 ára føðingardag. Dagurin er hin 1. apríl og júst stovningardagurin hjá Postverki Føroya, man fara í søguna sum ein hin stuttligasta aprílsøgan.

Henda søguliga føroyska postdag, hin 1. apríl 2001, verða tilsamans 9 frímerki givin út á tveimum smáørkum. Annað, eitt søguligt ark við trimum frímerkjum, har evni er júst føroyska postsøgan. Hin útgávan verður eitt størri ark við seks frímerkjum, har myndaevni eru tikin úr norrønu sagnunum og gudalæruni. Tað er Anker Eli Petersen, sum arbeiðir við hesum myndaevnum. Anker Eli ger eisini jólafrímerkini í ár. Har er evni Kristi føðing, við støði í Lukasar og Matheusar evangelii.

Í summar stendur list á skránni hjá Postverkinum. Við støði í málningalistini hjá Zachariasi Heinesen verður ein útgáva í juni, stutt eftir, at listamaðurin er farin um tey 65. Í alnótini upplýsir ein donsk heimasíða fyri myntsavnarar, www.numis.dk, at Zacharias Heinesen og teknarin hjá danska tjóðbankanum Helene Keller-Jacobsen samstarva um at gera nýggjar føroyskar pengaseðlar.

Annar føroyskur listamaður, sum er við í útgávuskránni hjá Postverkinum, er Edward Fuglø. Hann myndprýðir fýra frímerki og postkort, har evni er stórhvalur – avgustur, seiðhvalur, royður og nebbafiskur.

Frímerkjadeildin hjá Postverki Føroya hevur sum fáur megna at nýtt møguleikan við evarska lítla frímerkinum sum føroyskur sýnisgluggi móti alheiminum. Eisini við nýggju tøknini. Á heimasíðuni www.stamps.fo kunnu vit á føroyskum eins og á heimsins stóru málum, lesa um Føroyar, føroysku postsøguna, greinar um at arbeiða við frímerkjum, um útgávuætlanir og annað mangt.

Hóast 25 ára dagur Postverksins er hin 1. apríl í ár, kunnu vit á hesi heimasíðuni lesa, at longu í 1974/75 fór danska postverkið undir at framleiða føroysk frímerki. Postverkið í Føroyum nýtti hesi frímerki til frímerkingar av postsendingum og at selja til frímerkjasavnarar. Tey fyrstu føroysku frímerkini komu á marknaðin 30. januar 1975. Frá fyrsta degi sýndu frímerkjasavnarar í ymiskum londum stóran áhuga fyri føroysku frímerkjunum. Fleiri ferðir hava frímerki verið næststørsta føroyska útflutningsvøra.

Á heimasíðuni hjá Frímerkjadeildini verða eisini fleiri áhugaverd tíðarskeið í postsøguni lýst. Ein gloypibiti, mest fyri savnarar. Savnarar kring allan knøttin.

Og fyri tey, sum heldur vilja blaða í veruligum pappíri millum veruligar permur, verður hin 1. apríl ikki minni merkisverdur. Tá kemur út Føroya postsøga, sum Vilhelm Johannesen skrivar.

– Tað byrjaði fyri eini fimm árum síðani, tá eg hitti 95 ára gomlu Almu Rustin, sigur Vilhelm. Nú er hon farin um tey hundrað. Hetta førdi so til prát við onnur eldri fólk um postsøguna, eins og gransking av skjølum, ið høvdu við postin at gera. Nú er tað komið hartil, sigur Vilhelm, at ein bók skal koma út. Tað verður á 25 ára degum hin 1. apríl. Heitið er »Posturin í Føroyum 1870-2000« og í vavi verður bókin einar 400 síður við myndum.



*Vilhelm Johannesen skrivar postsøguna »Posturin í Føroyum 1870-2000«*